# Jólafløgan hjá Magna komin




Magni Christiansen úr Kvívík hevur nú latið fjórðu fløgu sína av hondum.

Á undanfarnu fløgunum vóru kendir sálmar, kryddaðir við countrytónleiki. Hesuferð er tó talan um eina jólafløgu.

Tíggju av kendastu føroysku jólasálmunum eru á fløguni – nakrir teirra sjálvandi eisini innspældir við countrydámi.

Magni hevur eina sera reina rødd, og hóast løgini fáa nýggjan búna við countryspælinum, so syngur Magni løgini, júst sum tey verða sungin í kirkjum og í samkomum.

Í sjálvum sanginum er hann sera trúgvur ímóti løgunum, uttan at broyta løgini við egnum innføllum og sonevndum »krúllum«. At hann syngur løgini, júst sum vit kenna tey, uttan at improvisera, ger tað sera lætt fyri øll at syngja við. Og tað má sigast at vera eitt sera stórt pluss, serliga fyri eina jólafløgu.

At sálmarnir eisini eru prentaðir inni í fløguhúsanum, ger tað enn lættari fyri øll at læra seg sangirnar og syngja við.

Fløgan eitur »Eg gleðist so hvørt jólakvøld«, og tað er eisini fyrsta lagið. Onnur løg á fløguni eru til dømis »Eg rósu upp sá næla«, »Her koma Jesus tíni smá«, »Nú ringja kirkjuklokkur so hátt« og »Gleðilig jól«.

Løgini eru væl vald og minna okkum á, hví vit halda jól.

Tað er Heimamissiónsforlagið, ið gevur jólafløguna hjá Magna Christiansen út.

Hon kann keypast frá Heimamissiónsforlagnum og á sølustøðum kring landið. Kostnaðurin er 169,- kr.

**eys**

# Magni Christiansen í Eydnuni

**Í Eydnuni á Oyrabakka arbeiða tey við at skipa fyri tiltøkum, sum kunnu fáa lív í økið. – Tað hevur verið sera tamt við tiltøkum í Eydnuni í seinastuni, men tað ætla vit at gera okkurt við, verður sagt**



**EYDNAN**
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Vit mugu viðganga, at tað hevur verið ógvuliga lítil aktivitetur í Eydnuni í seinastuni, men nú eru vit so farin at arbeiða við at bøta um tað, verður sagt úr Eydnuni.

Fyrsta tiltakið verður nú sunnudagin, tá Eydnan fyrst skipar fyri árliga jólabingo'inum, sum plagar at vera um hesa tíðina. Hetta plagar at draga nógv fólk, tí nógvir góðir jólavinningar eru at vinna.

Tað byrjar kl 16.00 sunnudagin.

### Magni Christiansen

Eftir at alt bingo tilhoyrið er ruddað burtur, verða dyrnar aftur latnar upp í Eydnuni. Hesuferð verður verður alt sett inn fyri at fáa fólk í jólahýr. Magni Christiansen fer at syngja og spæla løg av nýggju jólafløguni, og jólahugni verður eisini á skránni.

Borð, sum eini 6-8 fólk rúmast við, verða sett upp, soleiðis at fólk ikki skulu sita og hyggja í nakkan á hvørjum øðrum alt kvøldið.

– Vit royna at fáa fólk at koma í Eydnuna aftur. Til dømis arbeiða vit við at fáa dans til tey ungu. Vit vita at fullir bussar fara higani til Havnar við ungfólki, sum fara í dans. Ætlanin var eisini at hava eitt »syngið við kvøld« áðrenn jólini, men tað er so útsett, inntil einaferð eftir jól. Men væntandi leggur Magni einki í, um fólk syngja við, tá hann fer at upptraðka, siga tey í Eydnuni.

Kostnaðurin fyri kvøldið verður 80 kr fyri vaksin og 50 kr fyri børn. Tá fáa fólk rís á la'mande og kaffi ella saft og eina góða konsert.

Sagt verður, at konsertirnar hjá Magna plaga at draga nógv fólk, og tey í Eydnuni vænta eisini, at so verður sunnukvøldið. Men ætlanin er ikki at fylla so nógv fólk inn, at tað gerst trongt inni. Tí mæla fyrireikararnir til, at fólk ringja til Eydnuna á tlf 722322 og bíleggja atgongumerki.

## Jólatrøini í Tórshavnar kommunu og Velbastað



**Hóast stóra træið í miðbýnum í Havnini longu er tendrað, eru framvegis fleiri jólatrøð eftir at tendra í kommununi, nú hon er vaksin so nógv. Sunnudagin 5 desember verður restin av trøunum tendrað**

À Argjum, Hvítanesi, í Kaldbak, Norðradali , Kollafirði og á Velbastað verða trøini tendrað soleiðis:

**Í Kaldbak** verður jólatræið tendrað kl. 15.30. GHM fer at spæla jólaløg, og Sverri Steinhólm, prestur, og Beate L. Samuelsen, býráðslimur, fara at tala.

**Á Hvítanesi** verður jólatræið tendrað kl. 16.30. Havnar Hornorkestur spælir jólaløg, og Heri Joensen, prestur, og Beate L. Samuelsen, býráðslimur, fara at tala.

**Í Kollafirði** verður jólatræið tendrað kl. 16.30. Her fer Hornorkestrið hjá Frelsunarherinum at spæla, og Elsa Petersen fer at tala.

**Á Argjum** verður jólatræið tendrað kl. 17.00. GHM fer at spæla jólaløg, og Sverri Steinhólm, prestur, og Jan Christiansen, borgarstjóri, fara at tala.

**À Velbastað** verður jólatræið tendrað kl. 18.00. Havnar Hornorkestur fer at spæla jólaløg, og Heri Joensen, prestur, og Annfinn Brekkstein, bygdaráðsformaður, fara at tala.

**Í Norðadali** verður jólatræið tendrað kl. 18.30. GHM fer at spæla jólaløg, og Sverri Steinhólm, prestur, og Jan Christiansen, borgarstjóri, fara at tala.

**eys**

**merko** JÓLAKALENDARIN

*Mánadagur 6. desember 2004*

*Sukur 2 kg.*



7,95 merko

*BEDSTE's hveitimjøl 2 kg.*




7,95 merko

*POLAR ísar 1 litur*



14,95 merko



SPURNINGUR

Hvussu nógvir MERKO-handlar eru kring landið ?

Tilboðið er bert galdandi mánadagin 6. desember

SVAR

NAVN & TELEFON NUMMAR

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald. Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum

